Sosialurin



Tv3 • Sunnudag 9. kl. 20.00

**»Da Vinci Mysteriet«**

Forboðni filmurin er komin á skránna hjá Tv3. Morð er framt á heimskenda listasavninum Louvre. Gátuføru umstøðurnar kring brotsgerðina – súmbolir og slóðir, ið peika á bróðurringin við eini 2000 ára gomlum loyndarmáli – føra Langdon professara og kryptografin Sophie Neveu á eina hættisliga ódnarferð. Filmurin er grundaður á bestseljaran við sama navni.

Fríggjadagur 7. november 2008

# VARPIÐ

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið



Discovery • Fríggjadag 7. kl. 20.00

**»Mythbusters«**

Kann ein fótbóltur, sum er fyltur við helium flúgva longri ígjøgnum luftina og verða longri í luftini? Og ber tað til at fanga eina kúlu við berum tonnum? Adam og Jamie kanna málið nærri...



Dr1 • Mikudag 12. kl. 19.00

**»Romance and Cigarettes«**

Amerikanskur sangleikur frá 2005 við m.a. James Gandolfini, eisini Susan Sarandon og Kate Winslet. Nick verður tveittur út av konu hansara Kitty. Hon hevur funnið útav, at hann er henni ótrúgvur, og Nick má stríðast fyri at vinna hennarar álit aftur.